Páll á Reynatúgvu
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um hækkan av ferðagjøldum á Sandoyarleiðini, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Er ætlanin hjá samgonguni at hækka farmagjøldini á Sandoyarleiðini?

2. Er ætlanin hjá samgonguni at hækka ferðafólkagjøldini á Sandoyarleiðini?

3. Er tað ein fyrisitingarlig ella politisk avgerð at boða frá hækkaðum gjøldum á Sandoyarleiðini?

4. Hvør er orsøkin til hesa almennu fráboðan um prísbroytingar?

5. Er nóg stór játtan til siglingina hjá Hasfjord um Skopunarfjørð?

6. Lýkur Hasfjord øll trygdar- og manningarkrøv fyri at røkja siglingina um Skopunarfjørð?

7. Er tað vanligt, at SSL áleggur vinnu og ferðafólki hægri gjøld, um atløgukommunan krevur legugjald fyri skip hjá SSL?

Viðmerkingar

Nú tað frættist í miðlunum, at tað aftur skal skapast órógv um ferða- og farmaprísir á Sandoyarleiðini, er hóskandi at fáa landsstýrismannin at greiða frá støðuni.

Undanfarna samgonga byrjaði arbeiðið uppá Sandoyartunnilin, og sitandi samgonga heldur fram við arbeiðinum. Tað er gleðiligt at arbeiðið gongur væl. Kortini er neyðugt at tryggja støðug viðurskifti fyri vinnulív og fólk við siglandi farleiðini til koyrandi verður.

Fyrst stóð vaktarskipanin umborð á Teistanum fyri skotum, men tíbetur varð bakkað í hesum máli; og nú verður skaptur ófriður uppundir summarhálvuna við fráboðan um hækkandi gjøld á leiðini.

Fyri brúkarar av Sandoyarleiðini kann hetta vera sera ørkymlandi, og tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 15. mars 2021

Páll á Reynatúgvu